# Sorg og gleði...

VALSPENNINGUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Spenningurin var stórur í Norðurlandahúsinum, meðan valevnini fylgdu uppteljingini leygarkvøldið. Summi vóru ovurfegin, meðan onnur vóru vónbrotin. Soleiðis sá út ígjøgnum linsuna hjá myndamanni okkara**




*Royndir geva ikki altíð (val)úrslit. Hendan myndin av Bjarna Djurholm úr Fólkaflokkinum gjørdist kanska ein ímynd fyri úrslitið hjá landsstýrismanninum, sum ikki endurvann sessin í løgtinginum. Saman við Heðini Zachariassen fekk Bjarni Djurholm 317 atkvøður. Um ikki fínteljingin vísir nakað annað, verður lutakast um, hvør teirra skal verða eykamaður hjá Fólkaflokkinum*



*Samfelagsfrøðingurin og skemtarin, Sjúrður Skaale, er eitt av nýggju andlitunum í flokkinum. Her er úrsitið greitt fyri hansara viðkomandi*



*Miðnámsflokkurin varð ikki spáddur at hava nakran møguleika at koma á ting, og tað helt. Sjálvt um Bergur Johannesen var einasta valevni, fekk hann ikki allar av teimum 221 atkvøðunum. Listin fekk 16 atkvøður*